Sosialurin Nr. 69 - 7. apríl 2001 Vikuskifti 21
gult21 cyan21 magenta21 svart21

Jógvan Arge, sum her er avmynda›ur á stórsligna Luzjniki Stadion í Moskva, hevur í eitt mannaminni veri› fastur fúsur, tá fótbóltslandsli› okkara hevur spælt

Jógvan Arge, Moskva - Jógvan Arge, Sarajevo - Jógvan Arge, Landskrona - Jógvan Arge Belfast, Jógvan Arge, Landskrona - Jógvan Arge, Bukarest…

Drúgvasti leikarin á landsli›num

Fótbóltslandsli› okkara fer›ast nú á altjó›a pallinum á 12. ári›. Hóast skiftandi leikarar og venjarar, so hevur tó alla tí›ina veri› ein felagsnevnari kring li›i›. Líka miki› hvar á knøttinum fótbóltsdreingirnir hava fer›ast, hevur røddin hjá Jógvan Arge veri› vi›, solei›is at eisini vit her heima hava hoyrt, hvussu leikur er farin

SAMRØ‹A
Or›: Jákup Mørk
Myndir: Álvur Haraldsen

Sí›ani Føroyar av fyrstan sinni sluppu at blanda› seg upp i altjó›a fótbóltsheimin, hava ymsu fjølmi›larnir dúgliga vi›gjørt, hvussu okkara menn hava sta›i› seg. Kappast hevur veri› kring alt Europa móti alskyns londum, og sjálvandi hava kringstø›urnar um dystin veri› ymsar. Onkun ti› á heimskendum leikvøllum so sum Crvena Zvezda í Beograd og C. Vanden Stock í Belgia, me›an sta›arnavni› a›rar tí›ir hevur veri› minni hugvekjandi. Eitt nu á Serevalle í San Marino ella á Ta'Qali Stadion á Malta.

Ein felagsnevnari hevur tó alla ti›ina veri› í hesum frásagnum og vitjanum. Røddin hjá Jógvan Arge hevur hvørja fer› veri› á sta›num, og umvegis fartelefon, satelitt ella onkra a›ra tøkni hevur dysturin veri› varpa›ur heim til Føroya Fólk.

Seinasta landsli›sfer›in higartil gekk til Russlands, har okkara landsli› skuldi takast vi› russisku bjørnina. Me›an landsli›sleikararnir dagin fyri dystin sluppu at venja seg vi› undirlagi› á heimsgitna Luzjniki Stadion, fingu vit okkum eitt prát vi› útvarpsmannin, hvørs rødd man vera kend av hvørjum mansbarni her á landi.

Tri›ings øld á landsli›num

Hóast ta› nú eru li›in 12 ár, sí›ani sí›ani fyrsta undankappingardystin i Landskrona, so hevur Jógvan veri› vi› fótbóltslandsli›num í nógv longri tí› enn so.

- Eg plagi at siga ta›, at eg havi veri› á landsli›num sí›ani 1967. Tá var eg fyrstu fer› uttanlands og varpa›i fótbóltslandsdyst út. Ta› var ein dystur í Reykjavík millum føroyska landsli›i› og íslendska B-landsli›i›. Tann dystin haldi eg vit taptu 2-1, men vit vóru væl vi› í dystinum. Jón Sigur› Joensen úr Klaksvík skora›i føroyska máli› ta fer›ina, og eg haldi, at hann tá javna›i til 1-1.

- Sí›ani tá havi eg veri› vi› til teir nógvu landsdystirnar, sum Føroyar hava spælt. Í 70'unum var eg nakra fer›irnar í Íslandi, og eg havi onkun tí› veri› í Hetlandi og Orkney oyggjunum. Í 80'unum vóru ikki so nógvir landsdystir, men eg var so vi› til onkrar dystir tá eisini.

Einki er at taka seg aftur í, at møguleikin fyri landsdystum øktist munandi, tá Føroyar so eisini komu vi› í altjó›a fótbóltssamgonguna, FIFA, og sjálvandi var kenda útvarpsrøddin eisini vi›, tá sjøtul var› settur á hetta.

- Eg var til tann fyrsta dystin á Akranesi, sum var tann fyrsti FIFA-dysturin. Eg haldi hetta var í august mána›i í 1988, og ta› var hesin undarligi dysturin, tá Páll Gu›laugsson fekk íslendingarnar í off-side felluna 23 fer›ir. Ta› var sjálvandi spennandi at vera vi› til tann dystin, og tapi› upp á 1-0 var eisini eitt óvænta› gott úrslit, og eg minnist eisini Páll siga, at íslendingarnir høvdu fingi› ein ov lættan sigur.

Tiltrongdar avbjó›ingar

Eitt var FIFA limaskapur, og møguleiki at spæla altjó›a gó›kendar dystir, men veruliga kollveltingin kom kortini ikki fyrr enn Føroyar í 1990 sluppu at taka lut í EM-undankappingini. Tá komu brádliga fleiri n‡ggj lond á mótstø›ukortini, og sjálvsagt var hetta eisini naka›, sum økti um spenningin vi› at fylgja landsli›num.

- Ja, tá gjørdist hetta so til naka› heilt anna›. Ta› var væl eisini blivi› til ta›, at okkurt mátti henda. Eg hev›i tá varpa› fótbólt út í eini 25 ár, so hjá mær var ta› líka sum tí› uppá, at okkurt hendi. Ta› kundi gerast óinteressant at blíva vi›, bara at varpa føroysku landskappingina, og ongan tí› síggja nakran av teimum stóru leikarunum, uttan so at hetta fór fram á onkrum sjónvarpsskíggja.

- Ta› var sostatt vi› stórum spenningi, at vit fóru undir hetta her, og Útvarpi› leg›i beinan vegin stóran dent á at fylgja hesum landsli›num. Av tí at vit samstundis komu at kappast vi› Sjónvarpi›, gjørdu vit eisini av at senda tveir frásøgumenn vi› til dystirnar, tí vit hildu at tveir frásøgumenn betri megna at halda lív í eini reportasju, enn tá talan bert er um ein mann.

- Harumframt var› eisini lagdur dentur á, at tá vit vóru vi› landsli›num og vitja›u ymsu londini, so skuldu sendingar gerast um hesi londini, og hetta var eisini ein sera stór og spennandi avbjó›ing. Ta› er kanska ta›, sum mann hevur fingi› mest burtur úr á hesum fer›um. Ta› at mann hevur gjørt reportasjur um onnur samfelagsvi›urskifti enn fótbólt.



Uttan um fótbóltin
Fyri føroysku lurtararnar

Tá fótbóltsleikararnir hvíla seg, ver›ur fari› til verka. Fyrst skulu tekstirnir til ymsu innsløgini skrivast, og tá hetta er lisi› inn, skal tøkningurin syrgja fyri, at tilfari› kemur heim. Her eru ta› Jógvan Arge og Finnur Hansen, sum strí›ast á hotell kamarinum í Moskva

hevur helst eisini veri› galdandi, at allar hesar sendingar um ymsu londini hava veri› fylgdar vi› nærum eins stórum áhuga, sum sjálvir landsdystirnir hava veri› ta›. Vi› mikrofonini í hondini hevur veri› vitja› bæ›i eystureftir og su›ureftir, og fyri frásøgumenninar hevur talan sjálvandi eisini veri› um nógvar ymsar og spennandi upplivingar.

- Spennandi hevur ta› veri›. Vit hava m.a. veri› her í Moskva fyrr. Vit vóru í Rumenia eitt ári›, og ta› var sera, sera áhugavert. Eisini var ta› sera spennandi á Kypros, har vit royndu at grei›a frá, hvussu sundurb‡tt landi› var, men tann største upplivingin av øllum hesum mundi helst vera í Belfast. Har gjørdu vit eina rúgvu av sendingum um sundurb‡tingina millum Írland og Nor›urírland, og ta› var fantastiska spennandi. Eg veit ikki um ta› var so nógvur ófri›ur, akkurát me›an vit vóru har, men har var ein øgiligur spenningur. Nógvar herdeildir vóru at síggja á gøtunum, og mann fekk rættiliga varhugan av, hvussu fri›arligt vit hava ta› í Føroyum.

Landskrona var ta› største

At taka saman um allar tær upplivingar, sum væl dámdi frásøguma›urin hevur veri› fyri, er helst ov rúgvusmiki› til at fevna um einari einstakari bla›grein. Hetta hev›i kanska hóska› seg betri í onkrari av bókunum, sum Jógvan sjálvur skrivar. Vit settu tí spurningin, um ta› er nøkur einstøk uppliving, sum hann hevur hug at draga fram um hinar, og her var Jógvan Arge ikki í iva eitt sekund,

- Ta› er so púra klárt dysturin móti Eysturríki i Landskrona, sum var okkara fyrsti í EM-høpi. Ta› er nokk tann, sum var tann største upplivingin. Eingin ivi um ta›.

- Ta› var ein fantastisk løta, tá i› Torkil fór ígjøgnum, og ikki minst ta›, at verjan helt alla ta tí›ina, sum var eftir av dystunum. Jens Martin lá flatur undir tvørstongini, og Mikkjal og Jóannes og teir vardu av øllum alvi. Jú, ta› var heilt fantastiskt.

Eysturlendsk ávirkan

Eitt eru tær ítróttarligu upplivingar, men sum Jógvan longu hevur veri› inni á, so hava mentunarligu upplivingar eisini veri› stórar. Ta› at síggja, hvussu onnur samfeløg virka, er helst eisini naka›, sum ávirkar háttin, sum mann uppfatar sítt egna samfelag. Me›an landsli›i› solei›is hevur fer›ast, eru múrarnir rapa›ir eystanfyri, og Jógvan ásannar eisini, at hetta líka sum hevur sett naka› av perspektiv í hansara uppfatan av samfelagnum. Ikki minst nú Føroyar eru í eini liknandi stø›u, har tjó›skaparrørslan hevur fingi› eina sanna endurreisn.

- Eg havi hildi› alla tí›ina, sí›ani ta› byrja›i at renna saman millum eystur og vestur, at ta› skuldi vera løgi›, um hetta ikki eisini fekk ávirkan á hugsunarháttin í Føroyum. Vit leggja kanska ikki so grúiliga væl merki til ta›, men eg ivist onga løtu í, at vit eru heilt nógv ávirka› av tí, sum hendi eystanfyri, og tí skifti, sum hevur veri› her ímillum.

- Tann gongdin, sum er í tí føroyska samfelagnum í dag, er óiva› partvíst inspirera› av teimum hendingum, sum hevur veri› í hesum londum og eisini ø›rum londum eystanfyri. Hon er sjálvandi meira fri›arlig her hjá okkum, men eg trúgvi, at gongdin er ikki sørt ávirka› av øllum hesum, sigur Jógvan Arge at enda, og undirstrikar vi› hesum seinasta, at ta› at fylgja fótbóltslandsli›num sn‡r seg um so nógv anna› enn bert spæli› vi› rundu le›urkúluni.